From:	Tóri Højgaard
To:	Marjun Jacobsen
Cc:	Fíggjarmálaráðið; Elin Joensen
Subject:	Viðv. uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um talgildu postskipanina MínBoks.
Date:	9. februar 2026 19:37:13
Attachments:	Outlook-Dátueftirl.png

Góðan dagin

Fíggjarmálaráðið hevur sent í hoyring uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almennu talgildu postskipanina MínBoks.

Endamálið við uppskotinum er, at Føroya Rættur skal kunna senda "forkyndelse" umvegis MínBoks við tí rættarvirknaði, sum fylgir av § 203 í rættargangslógini.

Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið heimiðlar, at Føroya Rættur fær, og kann viðgera tær persónupplýsingar, ið eru í MínBoks. Ítøkiliga er talan um persónupplýsingar hjá tí, ið rætturin skal senda "forkyndelse" til. Ásetingin í nýggju § 3 a er greið og nøktandi í mun til sjálva viðgerðina.

Men sum Dátueftirlitið hevur víst á í sínum hoyringssvari til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (LM-052/2025), so eru ríkismyndugleikarnir í Føroyum hvørki fevndir av dátuverndarlógini ella av ES-fyriskipanini um dátuvernd (GDPR).

Dátueftirlitið er av tí fatan, at hetta hevur við sær, at ríkismyndugleikarnir eru at rokna sum triðjalond í dátuverndarhøpi, og av tí at ríkismyndugleikarnir ikki eru á listanum yvir lond við nøktandi verndarstøði, so er talan um somu støðu sum um talan var um eitt ótrygt triðjaland. Tað vil siga, at flutningur av upplýsingum til ríkismyndugleikarnar tí formliga eigur at lúka reglurnar um triðjalandsflutning í § 61 ella § 62 í dátuverndarlógini.

Tá Dátueftirlitið gjørdi táverandi Løgmálaráðið varugt við trupulleikan bleiv avgjørt, at fara undir eina tilgongd at góðkenna ríkismyndugleikarnar, og leggja teir afturat listanum yvir lond við nøktandi verndarstøði. Løgmansskrivstovan arbeiðir enn við hesum, og samskiftir javnan við Dátueftirlitið í hesum sambandi.

Av tí at arbeitt verður við at loysa trupulleikan, og av tí at kravboð frá Dátueftirlitinum um at steðga verandi fluttningi hevði havt sera stórar og umfatandi avleiðingar, hevur Dátueftirlitið avgjørt *ikki* at handhevja reglurnar um triðjalandsflutning hvat ríkismyndugleikunum viðvíkur, so leingi arbeitt verður við at finna eina varandi loysn át rupulleikanum. Heimildin ið hetta lógaruppskotið gevur, kann tí nýtast hóast krøvini í kap. 6 í dátuverndarlógini sum er ikki eru lokin.

Dátueftirlitið hevur ikki fleiri viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vinarliga

Tóri Højgaard
Stjóri

Dátueftirlitið

Postboks 300
FO-110 Tórshavn

Telefon: +298 30 91 00
Beinleiðis: +298 29 91 00
Teldupostur: dat@dat.fo
Heimasíða: www.dat.fo

Øll málsviðgerð á Dátueftirlitinum er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.